# FORD VIL HAVA KVINNULIGAR SNIÐGEVAR



Kvinnur skulu ikki longur bara liggja á motorhjálminum á Ford bilum, men eisini sita við tekniborðið.

Kvinnur hava ávirkan á 85% av øllum bilkeypum og keypa sjálvar 45% av øllum bilum, men kvinnur eru í stórum minniluta innan sniðgeving av bilum. Hetta vil Ford broyta, og leitar tí eftir kvinnuligum sniðgevum, ið kunnu tekna nýggju fordbilarnar, skrivar amerikanska tíðindablaðið The National Post.

Susan Lampinen, bólkaleiðari í sniðgevingardeildini hjá Ford í Norður Amerika sigur við The National Post, at ætlanin hjá Ford er, at kunna ungar kvinnur um, at sniðgeving av bilum er ein møguleiki fyri kvinnur. Ford hevur m.a. sett pengar av til at gjalda fyri skúlagongdina hjá kvinnum, ið vildu lesa bilsniðgeving á Detroit's College for Creative Studies.

*nud*

## HITLIST

**15 tær bestu** (ÚF)

| | | |
|---|---|---|
| 1 | The Dreams | Sasa Sa, Sa |
| 2 | BassHunter | Boten Anna |
| 3 | Marius | The Sky Is Our Home |
| 4 | Gestir | Hvørt Fótafet |
| 5 | The Rasmus | Sail Away |
| 6 | Outlandish | I Only Ask Of God |
| 7 | Teitur | Louis, Louis |
| 8 | Nelly Furtado | Maneater |
| 9 | Gnarls Barkley | Crazy |
| 10 | Rihanna | Unfaithful |
| 11 | Justin Timberlake | SexyBack |
| 12 | 200 | Graceland |
| 13 | Juanes | La Camisa Negra |
| 14 | Paris Hilton | Stars Are Blind |
| 15 | Nik & Jay | Boing |

**Eykaløg**

| | |
|---|---|
| Rascal Flatts | What Hurts The Most |
| Robbie Williams | Rudebox |
| Fergie | London Bridge (Oh Shit) |
| Muse | Knights Of Cydonia |
| Bob Sinclar & Cutee B | Rock This... |

**Tjeklisten** (DR)

| | | |
|---|---|---|
| 1 | Basshunter | Boten Anna |
| 2 | Nik & Jay | Boing |
| 3 | Outlandish | I Only Ask Of God |
| 4 | Nelly Furtado | Maneater |
| 5 | Christina Aguilera | Ain't No Other Man |
| 6 | Red Hot Chili Peppers | Tell Me Baby |
| 7 | Tina Dickow | Losing |
| 8 | Peter Sommer | 8-6-6-0 |
| 9 | Paris | Stars Are Blind |
| 10 | UFO Yepha | Hængekøjen |
| 11 | Bob Sinclar feat. Steve Edwards | World, Hold On |
| 12 | Razorlight | In The Morning |
| 13 | Raconteurs | Steady, As She Goes |
| 14 | Nordstrøm | Berlin |
| 15 | Kelly Clarkson | Break Away |
| 16 | Joey Moe | Miss Copenhagen |
| 17 | Spleen United | She Falls In Love With Machines |
| 18 | Pussycat Dolls feat. Snoop Dogg | Buttons |
| 19 | Gnarls Barkley | Crazy |
| 20 | George Michael | An Easier Affair |

**MTV European Top 20**

| | | |
|---|---|---|
| 1 | Christina Aguilera | Ain't No Other Man |
| 2 | Nelly Furtado | Maneater |
| 3 | Madonna | Get Together |
| 4 | Rihanna | Unfaithful |
| 5 | Gnarls Barkley | Crazy |
| 6 | Pink | Who Knew |
| 7 | Bob Sinclair | World Hold On |
| 8 | T.I. | Why You Wanna |
| 9 | Red Hot Chili Peppers | Tell Me Baby |
| 10 | Keane | Is It Any Wonder |
| 11 | Pussycat Dolls | Buttons |
| 12 | Paris Hilton | Stars Are Blind |
| 13 | Rihanna | S.O.S. |
| 14 | Black Eyed Peas / Sergio Mendes | Mas Que Nada |
| 15 | Busta Rhymes | I Love My Chick |
| 16 | Nerina Pallot | Everybodys Gone To War |
| 17 | Red Hot Chili Peppers | Dani California |
| 18 | Wyclef Jean / Shakira ´ | Hips Don't Lie |
| 19 | Lordi | Hard Rock Hallelujah |
| 20 | Ne-Yo | Sexy Love |

**Billboard**

| | | |
|---|---|---|
| 1 | Fergie | London Bridge |
| 2 | Gnarls Barkley | Crazy |
| 3 | Nelly Furtado Ft. Timbaland | Promiscuous |
| 4 | Cassie | Me & U |
| 5 | The Pussycat Dolls Ft. Snoop Dogg | Buttons |
| 6 | Sean Paul Ft. Keyshia Cole | (When You Gonna) Give It Up To Me |
| 7 | Panic! At The Disco | I Write Sins Not Tragedies |
| 8 | Christina Aguilera | Ain't No Other Man |
| 9 | Ne-Yo | Sexy Love |
| 10 | Young Dro Ft. T.I | Shoulder Lean |
| 11 | The Fray | Over My Head (Cable Car) |
| 12 | Beyonce Featuring Jay-Z | Deja Vu |
| 13 | E-40 Featuring T-Pain & Kandi Girl | U And Dat |
| 14 | Cherish Ft. Sean Paul | Do It To It |
| 15 | Yung Joc | It's Goin' Down |
| 16 | Rihanna | Unfaithful |
| 17 | Shakira Ft. Wyclef Jean | Hips Don't Lie |
| 18 | Kelis Ft. Too Short | Bossy |
| 19 | Lil Jon Ft. E-40 & Sean Paul | Snap Yo Fingers |
| 20 | Chingy Ft. Tyrese | Pullin' Me Back |

sound

# PAMELA ANDERSON OG KID ROCK GIFT TRIÐJU FERÐ



Fyrsta brúdleypið var hildið í St. Tropez
mynd: scanpix.dk

Pamela Anderson hevur eftir miseydnaða hjúnarbandið við Mötley Crüe trummarin Tommy Lee, eftir øllum at døma ætlanir um, at hjúnarbandið við nýggja mannin Kid Rock skal halda, í øllum førum hevur parið ætlanir um at verða gift fýra ferðir. Parið er longu gift í St. Tropez og Detroit, og hetta vikuskiftið stóð Nashville fyri tørn, tá parið varð gift triðju ferð, hetta skrivar enska blaðið The Sun. Framman fyri nøkrum fjepparum varð parið gift, og síðan sang rokksangarin Lynrd Skynrd hittið Sweet Home Alabama fyri brúður síni og fjepparum. Síðan varð veitsla hildin. Í næstum verður parið gift í Malibu.

*nud*

# BUSTA RHYMES HANDTIKIN Í NEW YORK



Busta Rhymes er settur í varhald í New York

Busta Rhymes var í vikuskiftinum handtikin í New York í sambandi við eitt mál um harðskap. Talan er sambært AP tíðindastovuni um eitt harðskapsmál, ið fór fram fyri eini viku síðan. Tó hevur tíðindastovan ikki nakað nærri um, hvat slag av harðskapi talan er um, ella hvør var fyri harðskapinum. Hvørki rappstjørnan ella umboðsfólk hansara hava úttalað seg í málinum. Í ferbruar varð ein lívverjunum hjá Rhymes skotin uttan fyri eitt upptøkuhøli, meðan rapparin var inni og tók upp til eitt sjónbandalag. Um hetta harðskapsmál er knýtt at hesi hending er ikki greitt enn, men løgreglan ætlar at avhoyra Rhymes um hetta mál eisini. Í amerikanska rappídnaðinum hava skotvápn verið dúgliga nýtt, hetta hevur m.a. beint fyri so stórum rappnøvnum sum Tupac Shakur, Notorious B I G og Jammaster Jay.

*nud*

# RUSSISKIR ÓTANGAR HÓTTA MADONNU



Sterku kristiligu ávisingarnar í pallframførsluni hjá Madonnu hava fingið øði í fólk
mynd: scanpix

Madonna fer í næstum á pall í Moskva við síni Confessions konsertferð. Hetta hevur fingið ilt í ótangar, ið hava hótt songkvinnuna við, at um hon spælir í Moskva, verða børn hennara Rocco og Lourdes burturflutt. Madonna sjálv hevur ikki tikið hóttanirnar, ið eru sendar til hennara umboðsstovu, fyri fult. Men maður Madonnu Guy Ritchie og stjórin fyri konsertferðina Chris Lamb eru fjálturstungnir, og hava hækkað trygdina á konsertferðini munandi. Konsertferðin hevur fingið sinnið í fleiri millum annað hevur katólska kirkjan funnist at tí partinum av konsertunum, tá Madonna verður krossfest. Eisini russiska ortodoksa kirkjan hevur fordømt hesum.

*nud*